## Rættarhjálpin til Vágs

Við í Vági verða tríggir ráðgevar, soleiðis at stundir eru til at veita ráðgeving til flest møgulig viðskiftafólk. Tó verður sagt, at tey, sum hava bílagt tíð frammanundan, verða tikin framum. Rættarhjálpin varð stovnað 1996 av sjálvboðnum juristum. Endamálið er at veita einstaklingum ókeypis løgfrøðisliga hjálp og rágeving til tess at tryggja teirra rættindi. Øll kunnu venda sær til rættarhjálpina, men víðkað hjálp verður veitt teimum, ið eru ringast fyri fíggjarliga. Raksturin av skrivstovuni verður fíggjaður við almennum studningi, men Rættarhjálp Føroya er ein sjálvsognarstovnur, sum er óheftur av almennum myndugleikum og privatum áhugamálum.



## Listavirðisløn til Sámal Blak

Havnarmaðurin, sum gongur á enskum listaskúla, hevur vunnið virðisløn fyri pallseting av Othello. Virðislønin eitur the Linbury Biennial Prize for Stage Design 2009. Á heimasíðuni, Arts.co.uk, verður skrivað, at Sámal við hesum er áttandi næmingurin av Central Saint Martin, sum vinnur virðislønina, síðani hendan av fyrstan tíð varð latin í 1987. Othello verður settur á pall í Birmingham í døgunum, 5. til 19. desember.

# Skrásetingarmálið tikið upp til dóms



*Tá lógin um skrásetingargjøld av akførum í 1999 varð broytt, fylgdi kunngerðin um heimild av krevja inn hesi gjøld ongantíð við. Tað hevur ført til eina stevning av TAKS eftir pengunum, sum kortini vórðu kravdir inn*

**Bilánarar, sum í tíðarskeiðinum frá 1999 fram til 2005 keyptu bil, vórðu kravdir eftir skrásetingargjaldið, sum bilasølurnar í fyrsta umfari rindaðu og síðani kravdu aftur frá bileigarunum. Men heilildin hjá TAKS vantaði, og tí er stovnurin stevndur eftir endurgjaldi**

BILASKRÁSETING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Hevði TAKS heimildirnar í lagi, tá stovnurin í tíðarskeiðinum 1999 fram til 2005 kravdi skrásetingargjald frá bileigarunum. Kunnu bileigarar, ið hava keypt bil í nevnda tíðarskeiði, fara beinleiðis til TAKS eftir endurgjaldi uttanum bilasølurnar. Og eru summi av málunum fyrnað.

Tað eru spurningarnir, sum dómarin skal taka støðu til.

Talan er sjálvandi um fleiri hundrað bilahandlar hesi seks árini, men fyri at spara bæði tíð og orku er semja um, at taka fram tvey mál og tveir bilaeigarar.

Talan er um Rodmund Nielsen, stjóra og politikara, og um Bjørn á Heygum, ið sum kunnugt er ein av framstandandi sakførarunum í Føroyum.

- Mítt mál er rættiliga serligt við tað, at bilafyritøkan, sum eg keypti bilin frá, er farin av knórannum, og tí ber heilt einfalt ikki til at fara eftir henni, sigur Bjørn á Heygum.

Hann heldur tað ikki verða í lagi, at hann á henda hátt ikki kann fara beinleiðis eftir TAKS, tí bilafyritøkan púra tilvildarliga ikki er til meira.

Málið byrjaði, tá lógin um skrásetingargjøld av akførum varð broytt í 1999. Trupulleikin var bert, at kunngerðin, sum heimilaði TAKS at krevja skrásetingargjaldið inn, ongantíð varð sett í gildi.

Hetta førdi so við sær, at TAKS í heili seks ár kravdi inn skrásetingargjøld frá bilasølunum, sum so aftur kravdi pengarnar inn frá bilakeyparunum.

Ikki fyrr enn í 2005, tá tað komst fram til, at heimildin vantaði, var hesin brølarin rættaður, so heimild nú finst fyri innkrevjingini.

Men hetta hevur so fingið bileigarar, sum hava keypt bil í tíðarskeiðinum 1999 til 2005, at stevna TAKS eftir pengunum, sum teir – sambært saksøkjarunum – ólógliga hava kravt inn.

### Jólagáva

TAKS hevur ført fram, at talan er um ein spurning millum bilasøluna og keyparan, og tað hevur so ført til, at keypararnir í teimum førum, har tað ber til, eisini hava stevnt bilasølunum – sum so aftur hava stevnt TAKS.

Við rættarforhandlingunum fyrr í ár legði dómarin upp til, at vald var ein ella fleiri sakir, sum vóru umboðandi fyri allar síðir av málinum, og semja varð síðani gjørd um, at velja tvær sakir út.

Onnur hevði flest øll aspektir: Stevning móti TAKS og stevning móti bilasøluni, bilasølan hevði stevnt TAKS, og viðkomandi hevði tveir bilar, har málið um annan var fyrnað.

Í hinari sakini er bilasølan ikki til longur, og tí er TAKS einasti møguleiki fyri stevning. Og í teirri sakini er tað Bjørn á Heygum sjálvur, sum er saksøkjarin.

Fríggjadagin hittust partarnir so aftur í Føroya Rætti, og málsviðgerðin tók meginpartin av degnum. Stórur partur av viðgerðini var rættiliga tekniskur, men TAKS hevði góðtikið, at hesi bæði málini vórðu førd sum royndarsakir.

- Talan er um ein prinsippspurning, og tí ber heldur ikki til at finna fram til eina semju í málinum, sigur Bjørn á Heygum.

Málið er nú tikið upp til dóms, og avgerðin verður kunngjørd 22. desember – og tað verður ein jólagáva til annan av pørtunum, so ella so.




*Amerikanskir fyrstu ferð húsakeyparar fáa framhaldandi 8000 dollarar í stuðli frá stjórnini*

# Frægari útlit í USA

**Líkt er til, at fíggjarkreppan so smátt er farin at hasa av í USA, og serliga smásølan hevur klárað seg betur enn væntað**

BÚSKAPUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í dag verður amerikanska smásølan kunngjørd, og marknaðurin væntar eina framgongd á 0,9%. Hetta kann fáa stóra ávirkan á virðisbrævamarknaðin.

Tað er serliga bilasølan og sølan hjá sølumiðstøðunum í oktober, sum hava eina positiva ávirkan, og føra framgongd við sær.

Smásølan hevur klárað seg betri enn væntað í 2009, og orsøkirnar eru fíggjarpolitisk tiltøk, skattalættar og stuðul til bila- og húsakeyp.

Tað skrivar Føroya Banki í sínari vikukunning.

Ídnaðarframleiðslan í Amerika hevur verið hækkandi tríggjar mánaðir á rað. Serliga framleiðslan av akførum hevur verið positiv, og orsøkin til tað er stuðul til bilakeyp.

Ein framgongd á o,4% er væntandi fyri oktober, og saman við ídnaðarframleiðsluni verður NAHB vísitalið kunngjørt mikudagin.

Stuðulin til húsakeyp er longdur, so tað framvegis fæst 8.000 dollarar í stuðli við fyrsta hús keyp.

Eisini í Týsklandi og Japan eru tølini positiv. Í dag verður BTÚ hjá Japan fyri triðja ársfjórðing kunngjørt, og roknað veðrur við einari framgongd á 0,7% í mun til seinasta ársfjórðing. Eisini Japan hevur framt fíggjarpolitisk tiltøk so sum skattalækking og stuðul til bilakeyp, skrivar Føroya Banki í sínari vikukunning.